

# Frítíðarhús við fantastiskum útsýni

Oman móti sandinum í Leynum standa gomlu húsini hjá Bakkalenu, sum í dag aftur eru komin til heiðurs og æru. Nærum hvør frítími hesi seinastu fýra árini er nýttur at seta húsini í stand

Tað var Martin Pætursson Hansen, ið fyri fýra árum síðani keypti húsini frá Bergi Godtfred.

– Eg gjørdist púra vekk í húsunum, longu fyrstu ferð eg sá tey. Eg orðaði við Berg Godtfred um at siga mær frá, seldi hann húsini, og fyri einum fýra árum síðani stóðu tey so til sølu í bløðunum, sigur Martin Pætursson Hansen.

Hann lá framvið og tað eydnaðist honum eisini at ogna sær sjáldsomu húsini.

– Av fyrstan tíð var tankin, at vit skuldu búgva har, men seinni er tann tankin sleptur. Nú er so ætlanin at nýta húsini sum frítíðarhús, sigur Martin Pætursson Hansen.

Hann sigur, at tað er ótrúliga nógv arbeiði lagt í húsini.

– Eg havi brúkt so at siga hvørt kvøld og hvørt vikuskifti at umvæla húsini. Tá eg keypti tey, vóru heili fimm rúm í miðhæddini, nú er alt eitt rúm, burtursæð frá einum WC við brúsu, sigur Martin Hansen.

Men hann hevur kortini ikki gjørt alt arbeiðið sjálvur.

– Eg havi fingið ógvuliga góða hjálp frá familju og vinmonnum. Eg hevði kortini ikki ímynda mær, at tað fór at gerast so tíðarkrevjandi, sum tað hevur verið, sigur Martin Pætursson Hansen.

**Umfatandi umvæling**

Tað er ikki bert tíð, ið er løgd í hetta arbeiði, men eisini nógvir pengar.

– Húsini hava eftirhondini verið rættiliga dýr. Tað er farin fram ein umfatandi umvæling, bæði innan og uttan. Alt er gjørt av nýggjum, tað verið seg undirsløg og útveggir. Heldur einki WC var í húsunum, men bert ein bukka í kjallaranum, sigur Martin Pætursson Hansen.